

**Tit hava tvey yderpunkt - annaðhvørt hava tit eina stutta fjarstøðu, har ein kann hyggja beinleiðis inn í eitt fjall, ella talan er um stóra fjarstøðu, har ein sær líka so langt sum eyga røkkur**

*- Her hjá tykkum verða ljósreglurnar frá akademi'inum ikki fylgdar, sigur Birger, sum her er avmyndaður í Árnafirði*
*Mynd: Høgni Thomsen*

## Serstakar ljósreglur

Í undirvísingini er júst hetta við ljóskelduni og ávirkan hennara eitt týdningarmikið evni. Í roynd og veru er hetta ein logisk niðurstøða.

Men tá Birger kom til Føroya mátti hann av sonnum gera upp við hesa støðuna: Hetta var kortini ikki so einfalt og líkatil!

– Eg gjørdist ikki sørt skelkaður, tá eg kom út í føroysku náttúruna, sigur hesin royndi undirvísarin og listamálarin.

Um ein í fyrsta lagi hevði ta høgu og sterku ljóskelduna, síðani hana í miðjuni og at enda ta myrku, so hendi tað javnan at skýggj komu ímillum og fangaðu ljósið.

– Har ein vanliga hevði ta logisku raðfylgjuna í ljósinum við 1, 2 og síðani 3, hevði ein her raðfylgjuna 1, 3 og síðani hana í miðjuni.

– Hetta kom púra óvart á meg, sum jú eri akademiskt útlærdur málari. Her var eg á einum staði, har ein líkasum ikki fylgdi ljósreglunum, sigur Birger.

## Eitt skýggj broytir alt

Fyri tann føroyska og ikki minst útlendska listamálaran er hetta við litskiftinum nakað, teir hava allar møguleikar at uppliva her á oyggjum okkara.

At eitt listafólk kann seta seg niður, hvar tað skal vera og – er ein heppin – kann staðfesta, at ikki eitt skýggj er á luftini.

– Kemur so brádliga eitt skýggj á luftina, so fangar hetta skýggið ljósstrálurnar frá sólini. Hetta ljósið kemur tí ikki niður á jørðina, og tað er júst hetta sum ger ljósspælið so spennandi.

– Á henda hátt fær ein jú bytt eitt sindur um uppá sínar ljóskeldur, sigur Birger.

## Stutt og long fjarstøða

Eitt annað serstakt fyribrygdi í føroysku náttúruni er tann stóri spenningurin í sjálvum landslagnum. Hetta er eisini eitt av evnunum, sum hann brúkar í undirvísing sínari.

– Tit hava tvey yderpunkt – annaðhvørt hava tit eina stutta fjarstøðu, har ein kann hyggja beinleiðis inn í eitt fjall, ella talan er um stóra fjarstøðu, har ein sær líka so langt sum eyga røkkur.

– Hetta virkar ógvuliga sterkt uppá okkum, at ein soleiðis kann verða settur mitt ímillum tvær slíkar síður, sigur hann.

Hesar umstøður og kor sær Birger týðiliga aftur í teimum føroysku listamálarunum, har teir á ein serstakan hátt megna at fáa ein mynd at vera tvey-dimensjonella.

– Hetta er nakað sum ein beinleiðis fær fyri einki frá náttúrunnar hond!



*– Í Føroyum ber til at býta um ljóskeldurnar, sigur Birger Møller*
*Mynd: Høgni Thomsen*